## Odmar Færø í Horsens

Odmar Færø hevur verið ein av eyðsýndastu B36 spælarunum higartil í ár. Ikki minst í UEFA Cup uppgerðunum ímóti Brøndby stóð Odmar seg væl, og á Brøndby stadion var hann framúr í miðverjuni. Donsk feløg hava lagt til merkis, hvussu stinnur 18 ára gamli B36 spælarin er. Í vikuskiftinum fór Odmar til Danmarkar, har hann í dag og í morgin venur við superliguliðnum hjá AC Horsens, veit heimasíðani hjá felagnum at siga. Tað tykist telja nógv í felagnum, at Odmar bæði er verjuspælari og miðvallarspælari. Odmar hevur spælt átta ferðir á U-17 landsliðnum og tíggju ferðir á U-19 landsliðnum. Venjari í Horsens inntil á nýggjárinum er Kent Nielsen, sum hevur megnað at fingið væl meiri burturúr, enn tey flestu høvdu roknað við. Á nýggjárinum fer Kent Nielsen at venja Brøndby. Tá verður Henrik Jensen, sum nú er hjálparvenjari í Brøndby, venjari í Horsens.

## Tórður og Øssur í Vejle

Teir báðir runavíkingarnir og U21-landsliðsspælararnir, Tórður Thomsen og Øssur Dalbúð, sum báðir eru úr NSÍ, hava seinastu vikuna verið í danska Vejle og vant. Úrslitini hjá føroyska U21-landsliðnum hava verið sera góð fyrstu undankappingina, og tað er ikki frítt, at hetta hevur vakt áhuga fyri fleiri av spælarunum, sigur Jákup í Stórustovu, sum umboðar flestu av føroysku landsliðsspælarunum. Og hann vísir als ikki aftur, at fleiri spælarar fara til venjingar uttanlands, nú føroyska kappingin endar um fáar vikur.

# Útisetarnir fækkast




*Jón Rói Jacobsen er ein av bara fýra útisetum, sum vóru við í javnleikinum móti Eysturríki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast úrslitið var gott leygardagin, so tykist tað vera alt longri til støðuna, sum landsliðsvenjararnir so ofta hava longst eftir, og sum ber við sær, at talið á útisetum á landsliðnum verður størri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Tað tóktist skelka allan fótbóltsheimin, at tað leygardagin eydnaðist føroyska fótbóltslandsliðnum at megna 2-2 á heimavølli ímóti Eysturríki.

At Føroyar fáa stig móti Eysturríki er sjálvandi góð søga, tí øll fótbóltsáhugað minnast framvegis 1-0 sigurin í Landskrona í 1990.

Søgan er eisini góð, tí tað er ikki á hvørjum degi, at Føroyar vinna stig í undankapping. Tað vóru fýra ár millum 2-2 á Kypros og so 1-1 ímóti Eysturríki leygardagin. Hetta var fyrsta stigið, sum Føroyar hava vunnið á Tórsvølli. Síðani stigið varð vunnið á Kypros, hevur føroyska landsliðið spælt átjan undankappingardystir, uttan at tað hevur eydnast at vinna stig.

Eftir 1-1 leygardagin verður við longsli droymt um, at Føroyar aftur skulu vinna trý stig. Jógvan Martin Olsen hevur havt ábyrgdina í trý ár. Seinasti dysturin við honum sum ábyrgdarmanni verður í Vilnius í Letlandi mikukvøldið. Avrikið leygardagin ber sjálvandi við sær, at tað var nógv hugaligari hjá landsliðnum at fara úr Vágum í morgun, enn tað hevði havt verið, um tað ikki hevði havt eydnast at vinna stig ímóti Eysturríki.

### Sjey fátøk ár

Tað eru meiri enn sjey ár síðani, at tað hevur eydnast at vunnið í undankapping. Síðsti sigurin varð vunnin 1. september 2001, tá ið Jens Kristian Hansen við brotssparki skoraði einasta málið ímóti Luksemborg á Svangaskarði. Tá var Allan Simonsen venjari.

Í tíðarskeiðnum 1994-2003, tá ið Allan Simonsen hevði ábyrgdina, vunnu føroyingar seks undankappingardystir: tveir ímóti San Marino, tveir ímóti Malta og tveir ímóti Luksemborg.

Bestu úrslitini hjá Allan Simonsen vórðu roknað at vera teir báðir javnleikirnir, sum hann uppnáddi. Teir vóru 3. september í 2000, tá ið úrslitið var 2-2 ímóti Slovenia, og 6. september 2002, tá ið úrslitið ímóti Skotlandi var 2-2. Báðir dystirnir vórðu spældir á Svangaskarði.

Henrik Larsen hevði ábyrgdina av landsliðnum 2003-2006. Tað eydnaðist honum bara at vinna stig í 2-2 javnleikinum á Kypros fyri fýra árum síðani.

### Færri útisetar

Leygardagin vóru fýra spælarar, sum umboða útlendsk feløg á føroyska liðnum: Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen úr Frem, Christian Høgni Jacobsen úr AB og Christian Lamhauge Holst úr Silkeborg. Allir spæla teir í næstbestu donsku deildini.

Jógvan Martin Olsen hevur ofta endurtikið, at um landsliðið skal lyftast, so er neyðugt við fleiri spælarum, sum hvørja viku spæla á høgum støði uttanlands. Sama sjónarmiðið høvdu Allan Simonsen og Henrik Larsen.

Teir fýra omanfyri nevndu spæla hvørja viku á grasi, men teir spæla ikki í fremstu donsku deildini.

Um sammett verður við, tá ið Henrik Larsen vann sítt einasta stig saman við Føroyum, so vóru fimm útisetar á liðnum á Kypros í 2004: Jón Rói Jacobsen, Frem, Julian S. Johnsson, ÍA Akranes, Fróði Benjaminsen, Fram Reykjavík, Claus Bech Jørgensen, Coventry FC og Andrew av Fløtrum, Fremad Amager.

Tá ið Føroyar 1. september 2001 vunnu 1-0 á Luksemborg vóru seks útisetar á liðnum: Jákup Mikkelsen, Molde, Óli Johannesen, Hvidovre, Súni Olsen, Zwolle, Christian Høgni Jacobsen, Esbjerg, Johan Byrial Hansen, OB og Julian S. Johnsson, Hull City, sum tá var í triði bestu eingilsku deildini, og sum nú er triði ovast í bestu eingilsku deildini.

Nú tykist ganga rætta vegin, hóast talið á útisetum er lækkað!

**Flestu landsdystir**

| | |
|---|---|
| Óli Johannesen | 82 |
| Jens Martin Knudsen | 65 |
| Julian S. Johnsson | 62 |
| Jákup Mikkelsen | 60 |
| John Petersen | 57 |
| Jákup á Borg | 57 |
| Allan Mørkøre | 54 |
| Øssur Hansen | 51 |
| Rógvi Jacobsen | 51 |
| Fróði Benjaminsen | 49 |

## Fróði er tann tíggjundi í røðini

**Í 1999 spældi hann fyrsta landsdystin, og mikukvøldið fer Fróði Benjaminsen at umboða Føroyar fyri 50. ferð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Kaunas, Litava:** Tá Jógvan Martin Olsen mikukvøldið sigur landsliðnum farvæl, fer ein av bygdarmonnum hansara av Toftum at umboða Føroyar fyri 50. ferð. Tað er Fróði Benjaminsen úr HB.

Fróði hevur verið mest sum fast inventar á liðnum, síðani hann fyri gott og væl níggju árum síðani fyrstu ferð trein inn á liðið. Tað var 18. august í 1999, tá ið Føroyar í vinardysti á heimavølli taptu 1-0 ímóti Íslandi. Ta ferðina varð Fróði í 77. minutti settur inn á miðvøllin sum avloysari fyri Sámal Joensen.

Í 2001 var Fróði við frá dystarbyrjan í dystinum móti Luksemburg, tá Sámal Joensen legðist sjúkur, og síðani hevur Fróði verið púrasta fastur maður í føroysku byrjunaruppstillingini.

Á landsliðnum hevur Fróði umframt B68 umboðað B36, HB og Fram Reykjavík, og burtursæð frá tveimum teimum fyrstu ferðunum og so aftur síðsta leygardag, so hevur hann verið millum teir fyrstu ellivu.

### Miðja og miðverja

Í nógvum teimum fyrstu landsdystunum var Fróði miðvallari. Tá ið Óli Johannesen fram ímóti endanum á sínari longu tíð á landsliðnum fleiri ferðir var noyddur at geva avboð, var Fróði í miðverjuni, har ætlanin var, at hann skuldi vera partur av makkarapari saman við Jón Róa Jacobsen.

Fyrr í ár varð Fróði so mikið skaddur, at hann varð noyddur at geva avboð til tríggjar dystir – ímóti Portugal, Serbia og Rumenia. Hesar tríggjar ferðirnar hava Jóhan Troest Davidsen, Jón Rói Jacobsen og Egil á Bø røkt tey bæði miðverjuplássini. Leygardagin fingu Egil og Jón Rói aftur møguleikan, og við bara trimum dystunum í beinunum valdi landsliðsvenjarin at lata Fróða byrja á beinkinum.

Longu í 1. hálvleiki leygardagin avloysti Fróði Mikkjal Thomassen, sum fór skaddur á vøllinum, og tað man vera lítil ivi er um, at Fróði verður millum teir fyrstu ellivu, nú hann fer at spæla landsdyst nummar hálvt hundrað.

Higartil hevur Fróði skorað tvey mál fyri Føroyar: Tað fyrra í 3-1 sigrinum í vinardystinum á heimavølli ímóti Liktinstein 21. august 2002, og hitt seinna var sigursmálið til 3-2 í vinardystinum á heimavølli ímóti Malta 18. august 2004.